Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	31. januar 2024
Mál nr.:	23/03209
Málsviðgjørt:	EØ
Ummælistíð:	5.-27. okt
Eftirkannað:	8. januar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg
um
Kervi+

Brúkarar

§ 1. Ásetingar í hesi løgtingslóg eru galdandi fyri brúkarar av Kervi+ skipanini, ið landsstýrisfólkið í útbúgvingarmálum varðar av. Ásetingarnar eru eisini galdandi, tá ið talan er um dátuflutning. Kervi+ er almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum. Ein brúkari fevnir um likamligar og løgfrøðiligar persónar, ið kunnu skráseta og móttaka upplýsingar úr Kervi+.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+.

Flutningur av upplýsingum

§ 2. Um persónsupplýsingar, ið eru skrásettar í Kervi+, skulu flytast millum skúlar, krevur hetta loyvi frá skrásetta. Um tann skrásetti er undir 18 ár, krevur hetta loyvi frá persóni, sum hevur lut í foreldramyndugleikanum.
Stk. 2. Gevur tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ikki loyvi eftir stk. 1, skal Undirvísingarstýrið partshoyra viðkomandi. Undirvísingarstýrið kann eisini partshoyra barnið. Metir Undirvísingarstýrið, at tað er til barnsins besta, at móttakandi skúlin fær persónsupplýsingarnar, kann Undirvísingarstýrið taka avgerð um, at fyrrverandi skúlin kann lata móttakandi skúlanum persónsupplýsingarnar.
Stk. 3. Avgerð eftir stk. 2 kann kærast til landsstýrisfólkið innan eina viku eftir, at avgerðin er fráboðað.
Stk. 4. Stovnar, ið eftir aðrari lóggávu hava rætt til ávísar upplýsingar, kunnu fáa upplýsingarnar úr Kervi+ uttan loyvi frá skrásetta ella tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan.
Stk. 5. Undirvísingarstýrið hevur heimild at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum og at útflýggja upplýsingarnar umvegis Kervi+.

Dátuábyrgd

§ 3. Undirvísingarstýrið er dátuábyrgdari, tá ið Undirvísingarstýrið nýtir upplýsingar í Kervi+ til egin endamál.

Stk. 2. Almenni stovnurin ella løgfrøðiligi persónurin, ið er brúkari av Kervi+, er dátuábyrgdari, tá ið brúkarin nýtir upplýsingar úr Kervi+ til egin endamál. Undirvísingarstýrið er í hesum sambandi dátuviðgeri vegna dátuábyrgdaran.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Undirvísingarstýrið viðger persónsupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 2.

Umsiting

§ 4. Undirvísingarstýrið kann nýta persónsupplýsingar í Kervi+ til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlum, eftirlit, o.a.

Gildiskoma

§ 5. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Ein nýggj heildarætlan fyri KT-umsiting í undirvísingarverkinum varð løgd fram og handað tann 4. september 2020 av táverandi landsstýrismanni. Tann 23. apríl 2021 samtykti Løgtingið, at heildarætlanin skuldi fremjast. Ein av høvuðstáttunum var at menna eina lestrarfyrisitingarskipan til m.a. fólkaskúlar, miðnámsskúlar, maritimar útbúgvingarstovnar, Heilsuskúlan (heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgving) og Fróðskaparsetrið (hægri útbúgvingar). Henda føroyska lestrarfyrisitingarskipan hevur fingið heitið Kervi+.

Endamálið er m.a. at veita eina KT-skipan, ið er trygg at brúka, ið skal tryggja, at persónsupplýsingar eru væl vardar, og sum ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi. Kervi+ tryggjar, at brúkarin tøkniliga og í aðrar mátar fær eina haldgóða og burðardygga loysn. Harumframt hevur Kervi+ til endamáls at hjálpa skúlum og stovnum at skipa virksemi og tilfeingi. Í høvuðsheitum fevnir hetta um upptøku, ráðlegging og skráseting av undirvísingarvirksemi, eftirmetingar, prótøkur, leiðslukunning, o.a. Upplýsingar, ið verða skrásettar í Kervi+ eru t.d. upplýsingar um næmingar, m.a. navn, p-tal, bústaður, og um næmingurin er undir 18 ár, so upplýsingar um, hvørji foreldrini eru. Eisini verða skrásettar upplýsingar um fráveru, prómet, próvtøl, upplýsingar um starvsfólk (lærarar, námsfrøðingar, o.s.fr.), og upplýsingar um bygningar og hølir. Skipanin er ikki liðugt ment, men ætlanin er, at allar viðkvæmar upplýsingar, t.d. heilsuupplýsingar (m.a. upplýsingar um sjúku ella serligan tørv), munandi sosialir trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti (t.d. sundurlesing, hjúnaskilnaður, familjustríð og upplýsingar um ættleiðing), verða skrásettar í eini skjalføringarskipan fyri seg.

Formliga er tað landsstýrisfólkið, ið er *eigari* av skipanini, meðan dagliga ábyrgdin og umsitingin av skipanini verður latin Undirvísingarstýrinum at umsita.

1.2. Galdandi lóggáva
Tað finst ongin lóggáva á økinum í dag.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at áseta yvirskipaðu rammurnar fyri nýtslu av upplýsingum úr Kervi+, og at áseta heimildir til at umsita Kervi+, samstundis sum Kervi+ við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við lógaruppskotinum verður tað ásett, hvør skal hava atgongd til Kervi+, hvussu flutningur av upplýsingum skal fara fram, dátuábyrgd og yvirskipaðar heimildir til at umsita Kervi+.

Mett verður, at tað er ein fyrimunur at áseta nakrar yvirskipaðar rammur fyri Kervi+ og umsitingina av skipanini, umframt at nágreina ávís viðurskifti, ið annars kunnu elva til iva.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis á hoyringarportalinum hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum frá 9. oktobur – 27. oktobur 2023.

Hesi hava eisini havt lógaruppskotið til hoyringar: Undirvísingarstýrið, NÁM, Hagstovan, Fróðskaparsetur Føroya, Dátueftirlitið, Yrkisdepilin, Heilsuskúlin, Landsfólkayvirlitið, Familjufyrisitingin, Føroya Lærarafelag, Pedagogfelagið, Felagið Maskimeistaralærarar, Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, Yrkisfelagið Miðnám, umframt øll aðalráðini.

Hoyringarfreistin var tann 27. oktobur 2023.

Hoyringarsvar eru komin frá ávikavist Yrkisdeplinum, Undirvísingarstýrinum, Námi, Fróðskaparsetri Føroya og Umhvørvisstovuni.

Yrkisdepilin tekur undir við endamálinum við lógini. Yrkisdepilin biður í hoyringarskrivinum um nakrar váttanir frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. T.d. biður Yrkisdepilin um váttan um, at Kervi+ ikki skal avloysa nakra skipan, sum Yrkisdepilin umsitur.
Yrkisdepilin ynskir eisini staðfest, at heimildir, sum liggja hjá Yrkisdeplinum, við lógaruppskotinum ikki leggjast yvir til Undirvísingarstýrið, og at Yrkisdepilin ikki verður undirlagdur leiðbeiningum, fyriskipanum, boðum ella líknandi frá Undirvísingarstýrinum. Harumframt ynskir Yrkisdepilin at fáa upplýst, um tað er møguligt hjá Yrkisdeplinum sjálvboðið at knýta egnar skipanir í Kervi+.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið váttar, at tað ikki er ætlanin, at Kervi+ skal avloysa nakra skipan, sum Yrkisdepilin umsitur, og heldur ikki, at heimildir, sum liggja hjá Yrkisdeplinum, við lógaruppskotinum skulu leggjast yvir til Undirvísingarstýrið.
Undirvísingarstýrið hevur dagligu ábyrgdina av Kervi+ og umsitur skipanina. Tað er tí Undirvísingarstýrið, ið ger av, hvussu skipanin skal nýtast, hvussu brúkarar skráseta upplýsingar í Kervi+, o.s.fr. Ein kunngerð verður gjørd, ið skal koma í staðin fyri eina dátuviðgerðaravtalu, men her verður leisturin í standardavtaluni hjá Dátueftirlitinum nýttur, har dátuábyrgdarin og dátuviðgerin hava ymiskar skyldur mótvegis hvørjum øðrum. Til seinast skal váttast, at tað er møguligt hjá Yrkisdeplinum at knýta egnar skipanir í Kervi+ eftir avtalu. Tó er neyðugt at greina hetta fyrst. Fígging er ikki sett av til at knýta skipanir hjá Yrkisdeplinum til Kervi+, og skal fígging/játtan tí fyrst fáast til vegar, um Yrkisdepilin ynskir hetta.

Undirvísingarstýrið fegnast um, at tað verður gjørd lóg um Kervi+, ið staðfestir ábyrgdarbýtið, trygd og rætt til brúk. Undirvísingarstýrið leggur dent á, at tað er av stórum týdningi, at skúlar, stovnar og brúkarar av skipanini annars verða skúlað og vegleidd í GDPR og dátutrygd, so hesi skilja sína ábyrgd í mun til handfaring av persónsupplýsingum. Undirvísingarstýrið heldur, at tað áttu at verið lagdar greiðari ásetingar inn um rættindi hjá teimum skrásettu. Harumframt hevur Undirvísingarstýrið hesar viðmerkingar til ítøkiligu ásetingarnar í lógaruppskotinum:

1) Til § 1, stk. 2: Undirvísingarstýrið heldur, at orðingin "*Landsstýrisfólkið **kann** gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+, umframt at gera reglur um dátuflutning"* eigur at verða broytt til "*Landsstýrisfólkið ger nærri reglur (...)*". Undirvísingarstýrið metir tað vera av stórum týdningi, at hesar reglur verða gjørdar, tá endamálið við uppskotinum er at tryggja, at persónsupplýsingar eru væl vardar og ikki skulu kunnu koma óviðkomandi í hendi.
2) Til § 2, stk. 1, 2 og 5: Undirvísingarstýrið undrast á, at tað skal gevast loyvi til at flyta upplýsingar millum skúlar, men ikki tá talan er um aðrar almennar stovnar. Undirvísingarstýrið metir, at tað átti at verið nágreinað neyvari í nærri reglum, hvørjar upplýsingar kunnu flytast frítt, og hvørjar upplýsingar krevja samtykki.

Undirvísingarstýrið undrast eisini á orðingina "barnsins besta" og metir, at tað átti at verið nágreinað, hvat hugsað verður um, ella funnið eina orðing, ið ikki er so løddd.

3) *Til § 2, stk. 3:* Undirvísingarstýrið setur spurnartekin við, um § 2, stk. 3 um kærumøguleika átti at verið í grein (§) fyri seg.
4) Til § 3, stk. 3: Undirvísingarstýrið heldur, at orðingin "*Landsstýrisfólkið **kann** áseta nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Undirvísingarstýrið viðger persónsupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 2.*" átti at verið broytt til "*Landsstýrisfólkið **ásetur** nærri reglur (...)*", tí tey meta tað vera av stórum týdningi, at hesar reglur verða gjørdar.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal fyrst viðmerkja, at ásetingar um rættindi hjá teimum skrásettu ikki eru í lógaruppskotinum, tí rættindini eru tey somu sum í kapittul 4 í dátuverndarlógini. Mett verður ikki, at tað er neyðugt at endurtaka ásetingarnar í hesum lógaruppskotinum.

Til 1) Kervi+ er ein dynamisk skipan, sum enn er undir agilari menning. Tað er ikki vist enn, at tað er neyðugt at gera nærri reglur, tí tað er enn ein møguleiki, at ávísir tvørleikar/umstøður kunnu loysast tøkniliga. Undirvísingarstýrið hevur til eina og hvørja tíð skyldu til at fylgja galdandi reglum um vernd av persónsupplýsingum. Í dátuverndarlógini eru ásettar greiðar meginreglur um viðgerð av persónupplýsingum. M.a. hevur Undirvísingarstýrið skyldu til at verja ímóti óheimilaðari atgongd til upplýsingar, og hvør dátuábyrgdari sær hevur eisini skyldu at fylgja reglunum í dátuverndarlógini. Mett verður tí, at møguligt er at veita somu trygd fyri vernd av persónsupplýsingunum, óansæð um tað verða gjørdar nærri reglur um hetta. Mett verður tí ikki, at neyðugt er at broyta orðingina.

Til 2) *Krav um loyvi tá talan er um skúlar, men ikki aðrar almennar stovnar:*

Almennir stovnar hava í summum førum sambært lóg rætt til at fáa ávísar upplýsingar frá øðrum stovnum (sí t.d. § 23, stk. 1 í lóg um lestrarstuðul). Tá ein rættur til upplýsingar er lógarheimilaður, kann hetta lógaruppskotið ikki avmarka tann rættin við at áseta, at almennir stovnar skulu hava loyvi frá foreldrunum, áðrenn teir kunnu fáa upplýsingarnar. Lógarverkið á skúlaøkinum hevur ikki ásetingar um flutning av upplýsingum. Tí eru § 2, stk. 1 og 2 einans viðkomandi, tá talan er um flutning av upplýsingum millum skúlar.

Upplýsingar, ið kunnu flytast:

Mett verður ikki, at tað er skynsamt at nágreina neyvari í nærri reglum, hvørjar upplýsingar kunnu flytast, tí tað er lætt at koma til at gera eina úttømandi uppreksan, sum ikki fevnir um allir viðkomandi upplýsingar. Mett verður, at tað í staðin skal fara ein ítøkilig meting fram í hvørjum føri, og at tað einans eru upplýsingar, ið eru viðkomandi hjá einum móttakandi skúla at fáa, ið loyvi skal fáast til vegar til.

Barnsins besta:

Hetta er hugtakið, ið verður nýtt, tá atlitið til barnið verður lýst í familjurættarligari lóggávu, t.d. foreldramyndugleikalógini, ættleiðingarlógini og barnaverndarlógini. Hugtakið kemur úr altjóða barnarættindasáttmálanum hjá ST og skal skiljast í tí samanhangi. Barna- og útbúgvingarmálaráðið sær tí ikki orsøk til at nýta eitt annað hugtak. Tó er nágreinað í serligu viðmerkingunum til § 2, stk. 2, at hugtakið skal skiljast eins og hugtakið í altjóða barnarættindasáttmálanum hjá ST.

Til 3) Ofta sæst í lóggávu, at ásetingar um kærumøguleika liggja aftarlaga í lógini. Hetta er viðkomandi, tá ið avgerðir, ið kunnu takast eftir fleiri ymiskum ásetingum í einari lóg, kunnu kærast. Í hesum førinum er tað einans avgerðin eftir § 2, stk. 2, sum kann kærast. Tað er tí mett at vera mest skynsamst í hesum førinum at knýta ásetingina um kærumøguleika til viðkomandi áseting, og ikki í grein (§) fyri seg.

Til 4) Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur undir við, at hesar reglur skulu gerast. Mett verður, at tað er skynsamt at gera nærri reglur, ið innihaldsliga lúka krøvini til eina dátuviðgerðaravtalu og eru bindandi fyri partarnar. Reglurnar koma harvið í staðin fyri dátuviðgerðaravtalur við hvønn einstakan Kervi+ brúkara sær. Orðingin "*Landsstýrisfólkið kann áseta (...)*" er tí broytt til "*Landsstýrisfólkið ásetur (..)*"

Nám hevur viðmerkingar til ítøkiligar ásetingar í lógaruppskotinum:
§ 1, stk. 1: Sum viðmerking til § 1, stk. 1 metir Nám, at Nám ella Prógvstovan eiga at verða nevnd í serligu viðmerkingunum sum dømi um, hvørjir avvarðandi myndugleikar kunnu verða.
§ 2, stk. 1: Nám spyr, um orðingin "*flytast millum **skúlar***"er nøktandi, og spyr, um tað kann verða talan um at flyta persónsupplýsingar millum t.d. stovnar.
§ 2, stk. 3: Nám ynskir at vita, hvat endamálið er við kærumøguleikanum, tá ið upplýsingar kunnu latast víðari til ein móttakandi skúla, og kærumyndugleikin samstundis kann brúka drúgva tíð upp á at viðgera kæruna.
Til § 3: Nám ynskir at fáa útgreinað, hvat "egin endamál" eru.
Til § 4: Nám spyr, um onnur dømir kunnu hugsast til orðingina "*Undirvísingarstýrið kann nýta persónsupplýsingar úr Kervi+ til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlunum, til eftirlit, v.m.* ". Eisini verður víst á, at lógin í fleiri førum nevnir, at landsstýrisfólkið *kann* gera nærri reglur og at tað í staðin kundi staðið, at landsstýrisfólkið "*ger*" ella "*skal gera*" nærri reglur.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingarnar til § 1, stk. 1 til eftirtektar. Nám og Prógvstovan eru nú nevnd í serligu viðmerkingini til § 1, stk. 1.
Til § 2, stk. 1: Almennir stovnar hava í summum førum heimild til at fáa upplýsingar frá øðrum almennum stovnum. Sí t.d. § 23 í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul (sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 135 frá 8. desembur 2023): "*Studni fær heimild til at fáa tær upplýsingar um tann einstaka umsøkjaran frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna/játta stuðulin og innkrevja lánini*". Í § 19d, stk. 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20 mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl. (sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desembur 2021) stendur: ""*Almannaverkið kann heinta inn upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um barnaískoyti frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi, ið hava kunnleika til viðurskiftini.*" Sí eisini dátuverndarlógina, § 31 í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir, o.a. (sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desembur 2021) og § 53, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur (sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022). Ein lógarheimilaður rættur til upplýsingar kann ikki avmarkast við eini áseting í hesum lógaruppskotinum, harvið at foreldrini skulu geva loyvi. Tað eru ikki slíkar ásetingar, um flutning av upplýsingum, á skúlaøkinum. Er heimild í aðrari lóggávu til at fáa upplýsingar, er ikki neyðugt við loyvi frá skrásetta, ella tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, fyri at fáa hesar upplýsingar. Tað er tá heimild í aðrari lóggávu fyri, at upplýsingarnar verða latnar víðari. Mett verður tí, at § 2, stk. 1 og 2 einans er viðkomandi fyri skúlar og ikki fyri flyting av upplýsingum millum skúlar og almennar stovnar.
Til § 2, stk. 3: Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur partvíst tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Tað er nú nágreinað í serligu viðmerkingunum, at fyrrverandi skúlin ikki hevur loyvi at senda upplýsingar til ein móttakandi skúla, fyrr enn kærufreistin er farin. Tað er tí ein vika, har upplýsingar ikki kunnu fara víðari. Kærumyndugleikin kann taka avgerð um, at eitt mál skal hava steðgandi virknað. Mett verður ikki, at reglur eiga at gerast fyri viðgerðartíðina hjá kærumyndugleikanum. Í staðin er nágreinað í serligu viðmerkingunum, at kærumyndugleikin skal miða ímóti at boða fyrrverandi skúlanum frá, um málið skal hava steðgandi virknað, áðrenn kærufreistin er farin, soleiðis at persónsupplýsingarnar ikki verða latnar víðari óheimilað. Verður avgerð tikin um, at kæran skal hava steðgandi virknað, má fyrrverandi skúlin

ikki lata persónsupplýsingarnar víðari, fyrr enn kærumyndugleikin hevur tikið endaliga avgerð í málinum.
Til § 3: Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir ikki, at tað er neyðugt at nágreina meira í serligu viðmerkingunum í hesum lógaruppskotinum, hvat "*egin endamál*" merkir. Barna- og útbúgvingarmálaráðið er ikki fakmyndugleiki, tá tað kemur til dátuvernd og dátuverndarlóggávu. Tær uppgávurnar liggja hjá Dátueftirlitinum. Víst verður í serligu viðmerkingunum til § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini, og at hugtakið skal skiljast í tí samanhangi.
Til § 4: Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur latið Undirvísingarstýrinum ymsar heimildir at útinna sína vegna, m.a. at umsita og hava eftirlit við ávísum skúlum. Mett verður, at Undirvísingarstýrið skal hava greiða heimild at nýta upplýsingar úr Kervi+ til at umsita eftir, til at hava eitt nøktandi eftirlit, veita ráðgeving til skúlarnar, o.s.fr. Tað er tó einans teir í delegatiónsskrivinum nevndu útbúgvingarstovnarnir, ið Undirvísingarstýrið skal hava eftirlit við og umsitingina av. Verður delegatiónsskrivið broytt, kann hetta hava ávirkan á, hvørjar upplýsingar Undirvísingarstýrið hevur rætt til at heinta og brúka úr Kervi+.
Nám vísir til seinast á, at tað í lógaruppskotinum fleiri ferðir stendur, at landsstýrisfólkið *kann* gera nærri reglur. Viðvíkjandi til § 1, stk. 1, sí svarið til Undirvísingarstýrið til 1) har greitt verður frá, at mett verður ikki, at orðingin í § 1, stk. 2, har tað stendur at "*landsstýrisfólkið kann*" skal broytast til "*landsstýrisfólkið skal*". Viðvíkjandi § 3, stk. 3, sí svar til Undirvísingarstýrið til 4), har orðingin er broytt til at "*landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur*". § 4, stk. 2 er strikað, tí heimildin at gera nærri reglur eftir § 4, stk. 1 ikki verður mett at verða neyðug.

Fróðskaparsetur Føroya hevur gjørt viðmerkingar til ítøkiligar ásetingar í lógaruppskotinum.
Sum viðmerking til § 1, stk. 2 mælir Fróðskaparsetur Føroya til at nágreina nøkur viðurskifti, undir hesum, at broyting í reglunum um brúkarar og atgongd ikki kunnu førast aftur til dátuábyrgdaran, sum upprunaliga bað um persónsupplýsingarnar, umframt rættindi hjá skrásetta.
Sum viðmerking til § 3, stk. 2 mælir Fróðskaparsetur Føroya til, at tað skal gerast greitt í lógaruppskotinum, at tað skal bera til at krevja av Undirvísingarstýrinum at fáa eina dátuviðgerðaravtalu, sum lýkur ES-krøvini.
Sum viðmerking til § 3, stk. 3, mælir Fróðskaparsetur Føroya til, at reglurnar, sum skulu koma í staðin fyri dátuviðgerðaravtalur, taka støði í longru dátuviðgerðaravtaluni, ið danska Datatilsynet hevur góðtikið.
Til § 4, stk. 1 og 2 verður viðmerkt, at lógarteksturin skal vera meira ítøkiligur, og spyr, um tað er ein "blankokekkur" til Undirvísingarstýrið, at tað stendur, at Undirvísingarstýrið kann nýta persónsupplýsingar úr Kervi+ *"til umsiting av skúlunum, til eftirlit, v.m."*

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Til § 1, stk. 2: Fróðskaparsetur Føroya metir, at tað kann gerast ein trupulleiki, um landsstýrisfólkið fer at gera reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+, vegna at upprunaliga endamálið við at innheinta upplýsingarnar møguliga ikki er til staðar, um landsstýrisfólkið seinni broytir reglurnar. Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir, at Fróðskaparsetur Føroya hevur misskilt endamálið við hesari áseting. Vísast skal til serligu viðmerkingarnar, ið nágreina, hvat heimildin í § 1, stk. 2, er ætlað til. Eisini skal vísast á, at dátuverndarlógin (løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum) er galdandi og skal fylgjast hóast hetta lógaruppskot. Í § 4 í dátuverndarlógini (og serligu viðmerkingarnar til hesa) stendur, at ásetingar um viðgerð av persónsupplýsingum í aðrari lóggávu, sum geva skrásetta eina betri rættarstøðu, ganga fram um ásetingarnar í hesi løgtingslóg (dátuverndarlógini). Hetta merkir, at ásetingar í aðrari lóggávu, sum geva skrásetta eina vánaligari rættarstøðu ella verndarstøðu, ikki ganga fram um dátuverndarlógina. Útgangsstøðið er tí, at tað ikki kann

víkjast frá verndarstøðinum í dátuverndarlógini. Undirvísingarstýrið hevur ikki heimild til at geva óheimilaða atgongd til Kervi+. Endamálið við Kervi+ er nevniliga at veita eitt hægri trygdarstøði, enn verandi skipanir gera í dag. Ásetingin í § 1, stk. 2 verður tí varðveitt, tó so verður tikið burtur, at landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur um dátuflutning, men einans gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+. Sí serligu viðmerkingarnar til § 1, stk. 2.
Til § 3, stk. 2 og 3: Tað er ikki skynsamt at gera dátuviðgerðaravtalur við hvønn einstakan brúkara av Kervi+. Mett verður, at tað er meira skynsamt at gera eina kunngerð, ið er eins bindandi fyri partarnar, og har somu treytir eru galdandi fyri allir brúkarar, stovnar, v.m.. Hetta hevur minni umsiting við sær, og á henda hátt verða treytirnar tær somu fyri allar stovnar/brúkarar. Ætlanin er at gera eina kunngerð, ið tekur støði í longru, góðkendu dátuviðgerðaravtaluni.
Til § 4, stk. 1 og 2: Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur gjørt delegatiónsskriv, ið er latið Undirvísingarstýrinum at umsita og at hava eftirlit við ávísum skúlum. Fyri at kunnu umsita og hava eftirlit, má Undirvísingarstýrið hava atgongd til neyðugar upplýsingar, fyri at lofta uppgávuni á einum nøktandi støði. Undirvísingarstýrið skal tó yvirhalda meginreglurnar fyri viðgerð av persónsupplýsingum í dátuverndarlógini (§ 7) og skal einans viðgera persónsupplýsingar, um hetta er neyðugt, hava eitt greitt endamál við viðgerðini, avmarka sína atgongd til neyðugar upplýsingar, o.s.fr.

Umhvørvisstovan vísir á, at uppskot til løgtingslóg um Kervi+ greitt eigur at áseta í hvørjum støðum, til hvat endamál og undir hvørjum umstøðum Undirvísingarstýrið hevur heimild at útflýggja upplýsingar umvegis Kervi+.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingarnar frá Umhvørvisstovuni til eftirtektar, og hevur nágreinað í serligu viðmerkingunum, hvørjar upplýsingar talan er um, hvat endamálið er við at við at heinta og útflýggja hesar upplýsingar, og undir hvørjum umstøðum, tað verður mett at vera neyðugt at útflýggja hesar upplýsingar umvegis Kervi+.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

KT-skipanir eru, sum eru í rakstri í dag, sum Kervi+ fer at avloysa. Verandi KT-umsitingarskipanir, eitt nú verandi Kervi, Tímaglasið, Prógvbókin hjá Setrinum og aðrar skipanir, hava útreiðslur við sær til rakstur, umsiting, einkarloyvi (licensir), o.s.fr.

Tá ið Kervi+ er liðugt ment og verksett, verður tørvur á fígging til framhaldandi rakstur og viðlíkahald. Væntast kann, at framhaldandi rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur (tó ikki víðarimenning) kunnu fíggjast av umskipanum í verandi KT-loysnum og fyriskipanarligum bygnaðum, á tann hátt, at kostnaðurin fyri verandi KT-skipanir og umsitingina av teimum í staðin verður goldin til Kervi+, tá ið Kervi+ verður verksett og avloysir aðrar KT-skipanir. Á tann hátt fer Kervi+ væntandi ikki at kosta meira, enn verandi KT-skipanir kosta landinum í dag í rakstri.

Kervi+ er partvíst verksett. Skipanin er verksett fyri Fróðskaparsetur Føroya. Næsti móttakari av skipanini eru fólkaskúlarnir, og síðani miðnámsskúlar, heilsuskúlar og maritimar útbúgvingar. Allir hentleikar í skipanini skulu sambært ætlan verða liðugt mentir í endanum av 2025.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kervi+ skal gera tað lættari, skjótari og smidligari hjá útbúgvingarstovnunum at umsita undirvísingaverkið. Fyri at tryggja, at umsitingin verður effektiviserað, hava allir áhugapartar samstarvað um skipanina. Veitarin hevur sostatt ment skipanina til brúkaran, saman við brúkaranum.

Effektiviseringin á samlaða økinum merkir, at orka kann frígevast hjá skúlunum og útbúgvingarstovnunum, og í staðin brúkast upp á meira týðandi námsfrøðiligar uppgávur. Talan verður um minni umsiting hjá skúlum og útbúgvingarstovnum, og hevur tað tí m.a. við sær betri grundarlag undir at menna góðskuna av útbúgvingunum.

Lógaruppskotið hevur við sær, at umsitingin av Kervi+ verður miðsavnað í Undirvísingarstýrinum. Lógaruppskotið hevur tí umsitingarligar avleiðingar fyri Undirvísingarstýrið (landið). Ætlanin er eisini, at hagtøl skulu gerast og brúkast í størri mun enn í dag, og fer hetta tí eisini at fylla meira í umsitingini. Tað krevur ikki lógarheimild at gera hagtøl. Undirvísingarstýrið kann tí nýta persónsupplýsingar í Kervi+ til at gera hagtøl. Heldur ikki er krav um heimild fyri at almannakunngera hagtøl. Tó er krav sambært dátuverndarlógini, at tað ikki ber til at eyðmerkja persónar út frá hagtølunum. Dátuverndarlógin ásetir, at seinni viðgerð av persónsupplýsingunum, enn upprunaliga endamálið, kann fara fram við søguligum, hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli (§ 7, stk. 3 í dátuverndarlógini). Eisini tá ið talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar (§ 18 í dátuverndarlógini). Hagtøl eru sera avgerandi, og ein fortreyt, tá talan er um at betra dygdina á økinum (umsitingina, menningina og ráðleggingina), og við Kervi+ ber til at savna hesar upplýsingar saman og fáa eina betri heildarmynd av undirvísingarverkinum og sum liður í eftirlitinum.

Umsitingarligar avleiðingar kunnu vera, um ein útbúgvingarstovnur ikki er partur av Skúlaneti. Skúlanet er eitt nýtt undirstøðukervi, har allar tænastur og veitingar til brúkarar verða skipaðar (Skúlanet), ið er tøkt fyri skúlarnar. Skúlanet er ein veiting frá KT-Landsins, sum er skipað á Gjaldstovuni. Tað er hvør kommuna sær, ið ger av, hvørt hon ynskir at gerast partur av Skúlaneti. Við innliman í Skúlanet fylgja m.a. hesar tænastur: veiting av teldum, ið eru útgjørdar við øllum neyðugu trygdarhentleikum, eitt trygt net, trygga hýsing, journalskipan, dagliga brúkaraumsiting og KT-hjálp. Harumframt veitir Skúlanet ein KT-trygdarpakka, ið er í samsvari við dátuverndarlógina og (sum nú er) ISO/IEC 27001/27002. Við hesum fáa skúlar og stovnar eina árliga trygdarfrásøgn, ið byggir á KT-grannskoðanarváttanir og innanhýsis skoðan.

Um man er dátuábyrgdari eftir dátuverndarlógini, er eitt krav m.a. eitt nøktandi trygdarstøði. Sum ásett í § 3, stk. 2 í hesum lógaruppskoti, er almenni stovnurin (t.d. skúlin) dátuábyrgdari fyri tær persónsupplýsingar, ið viðkomandi skrásetur í Kervi+. Stovnar, ið ikki eru partar av Skúlaneti, skulu kunna vísa á, at teir hava eitt nøktandi KT-trygdarstøði.

Ávísir skúlar hoyra undir § 7 í rundskrivi um KT-trygd (stovnar við serliga týðandi upplýsingum). Hetta eru skúlar, ið goyma prógv. Av tí at prógv frameftir fara at liggja í Kervi+, fara hesir skúlar at spara fíggjarliga og umsitingarliga, tá ið Kervi+ verður verksett fyri teir.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna. Tað eru fólk úr vinnuni, ið hava neyðugu førleikarnar, sum hava ment Kervi+, og somuleiðis verða tað fólk úr vinnuni, ið skulu taka sær av rakstrinum og menna Kervi+ víðari.

Hinvegin verða tað aðrir veitarar, sum ikki framhaldandi skulu veita tær skipanir, sum teir gera í dag. Hetta vegna, at Kervi+ fer at avloysa hesar skipanir.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar og felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Evropeiski mannarættindasáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki við sær ávís gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ásett verður í § 1, stk. 2, at landsstýrisfólkið kann gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+.

Í § 3, stk. 3 verður ásett, at landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Undirvísingarstýrið viðger persónsupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 1. Henda áseting kann brúkast til at gera reglur, ið hava við sær, at tað ikki er neyðugt at gera einstakar dátuviðgerðaravtalur við allar brúkarar (skúlar og stovnar) av Kervi+. Ein kunngerð kann gerast í staðin, ið setur somu krøv til partarnar, sum ein dátuviðgerðaravtala hevði gjørt.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Til stk. 1.
Við lógaruppskotinum verður Kervi+ viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingar-skipanin í Føroyum.

Lógin er galdandi fyri brúkarar av Kervi+. Ein *brúkari* fevnir bæði um ein, sum hevur atgongd til at fara inn í Kervi+ at skráseta upplýsingar og ein, ið hevur atgongd til at móttaka upplýsingar úr Kervi+ (t.d. lesiatgongd). Løgtingslógin er eisini galdandi, tá ið talan er um dátuflutning, t.v.s. tá integratión millum Kervi+ og aðrar skipanir verður gjørd, harvið at dátuflutningur fer fram.

Tað er Undirvísingarstýrið, ið ger av, um atgongd skal tillutast til Kervi+ og um integratiónir skulu gerast. Undirvísingarstýrið skal einans tilluta atgongd til Kervi+, um talan er um eitt ítøkiligt, sakligt og neyðugt endamál hjá móttakaranum ella nýggja brúkaranum. Somuleiðis skal Undirvísingarstýrið einans góðtaka integratiónir, um heimild er í reglugerð (t.d. dátuverndarlógini ella í aðrari reglugerð) at viðgera upplýsingarnar.

Ein myndugleiki, ið ger av, til hvat endamál persónsupplýsingar skulu viðgerast, er dátuábyrgdari sambært ásetingunum í dátuverndarlógini. Tann myndugleikin, ið er dátuábyrgdari, hevur ábyrgdina av at vísa á, at myndugleikin hevur heimild at fáa atgongd til upplýsingarnar ella eitt sakligt og neyðugt endamál við at fáa upplýsingarnar. Broytist reglugerðin ella heimildirnar hjá myndugleikanum, t.d. at fáa ávísar upplýsingar, hevur myndugleikin fráboðanarskyldu yvir fyri Undirvísingarstýrinum. Ein broyting í heimildunum kann hava við sær, at ein integratión millum Kervi+ og aðrar skipanir antin skal broytast, ella at ein integratión skal strikast, ella at ein brúkari skal strikast ella tillagast.

Brúkararnir av skipanini kunnu m.a. verða næmingar, tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, skúlarnir og avvarðandi myndugleikar. Avvarðandi myndugleikar kunnu m.a. verða aðalráðið, Undirvísingarstýrið, kommunurnar, Nám (undir hesum Prógvstovan), Studni, Yrkisdepilin, o.o.

Til stk. 2.
Landsstýrisfólkið hevur heimild til at gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+. Í viðmerkingunum til stk. 1 er ásett, hvørjir brúkararnir av skipanini í høvuðsheitum eru. Heimildin í stk. 2 kann m.a. nýtast til at áseta nágreiniligari reglur um, hvør kann gerast brúkari, hvussu nógvar brúkarar ein skal hava, um ein persónur t.d. starvast í fleiri skúlum, hvussu brúkarin skal skipast, um eitt starvsfólk á einum skúla fær upplýsingar um næmingar frá øðrum skúlum (t.d. gjøgnum førleikastovur), o.s.fr.

Til § 2
Til stk. 1.
Ásett verður, at um persónsupplýsingar skulu flytast millum skúlar, skal tann skrásetti loyva hetta. Er tann skrásetti undir 18 ár, skal loyvi fáast til vegar frá persóni, sum hevur lut í

foreldramyndugleikanum. Har talan er um felags foreldramyndugleika, er nokk við loyvi frá tí eina persóninum við foreldramyndugleika. Ásetingin er bæði galdandi, tá ið talan er um vanligar og viðkvæmar persónsupplýsingar.

Talan er ikki um eitt samtykki eftir § 6, nr. 10 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum (hereftir dátuverndarlógin). Sambært § 9, stk. 3 í dátuverndarlógini um samtykki, skal skrásetti til eina og hvørja tíð kunna taka sítt samtykki aftur. Hetta kunnu myndugleikar í Føroyum ikki liva upp til í roynd og veru í skrivandi stund. Almennir stovnar hava journaliseringsskyldu. Harumframt mugu almennir stovnar ikki strika upplýsingar uttan heimild frá Tjóðskjalasavninum (áður Føroya Landsskjalasavn), sbrt. § 5, stk. 1 í kunngerð nr. 117 frá 5. juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni. Er talan tí um upplýsingar, ið ein myndugleiki hevur skyldu at skriva niður og journalisera, kunnu upplýsingarnar ikki strikast, um tann skrásetti biður um, at myndugleikin strikar upplýsingarnar. Fyri ikki at áseta nakað, sum myndugleikar í roynd og veru ikki kunnu liva upp til, verður *loyvi* nýtt í staðin fyri *samtykki*. Munurin á loyvi og samtykki er harafturat, hvussu fyrispurningurin kann setast upp. Munur er eisini á, hvussu ítøkiligt og greitt svarið skal verða frá skrásetta.

Verður loyvi givið, ella hevur Undirvísingarstýrið sbrt. § 2, stk. 2 í hesum lógaruppskoti tikið avgerð um, at upplýsingar skulu latast einum øðrum skúla, er talan um, at viðgerðin av viðkvomum persónsupplýsingunum hevur sína viðgerarheimild í § 12, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini, harvið at viðgerðin er heimilað í lóg (lóg um Kervi+).

Til stk. 2.
Ásett verður, at um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ikki geva loyvi eftir stk. 1, skal Undirvísingarstýrið partshoyra viðkomandi. Um Undirvísingarstýrið metir, at tað er barnsins besta, at móttakandi skúlin fær persónsupplýsingarnar, kann Undirvísingarstýrið taka avgerð um, at fyrrverandi skúlin kann lata móttakandi skúlanum persónsupplýsingarnar.

Um ein næmingur skiftir skúla, er útgangsstøðið, at persónsupplýsingar ikki sjálvvirkandi verða latnar móttakandi skúlanum. Talan er um tveir sjálvstøðugar stovnar, og upplýsingar kunnu einans latast einum øðrum myndugleika, um heimild er hesum viðvíkjandi (t.d. í dátuverndarlógini ella í aðrari lóggávu).

Tað er sera týdningarmikið fyri barnið, at ávísar upplýsingar fylgja barninum. Hetta m.a. fyri, at móttakandi skúlin kann geva barninum tær best møguligu umstøðurnar, og fyri at lofta tí tørvinum, sum barnið hevur. Skúlar í dag samskifta ikki nóg væl, áðrenn eitt barn flytur skúla. Í summum førum kunnu teir ikki samskifta, t.d. um serligan tørv og heilsuviðurskifti, sum eru viðkvæmar upplýsingar, uttan at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, samtykkja til tess, sbrt. § 12 í dátuverndarlógini. Hetta hevur við sær, at børn ikki verða loftað eins væl, og tey kundu verið, um skúlarnir høvdu allar neyðugar upplýsingar.

Er talan um serligan tørv, skal skjalprógv fyri møguligum útgreiningum, diagnosum, v.m. fyriliggja, fyri at skúlin kann geva neyðuga stuðulin ella veita neyðuga hjálp ella hjálparamboð. Í slíkum førum er tað av stórum týdningi, at móttakandi skúlin fær upplýsingar frá fyrrverandi skúlanum (skúlin, sum barnið flytur úr). Talan kann t.d. eisini vera um serligar umstøður í fyrrverandi skúlanum, ið fyrrverandi skúlin metir, at móttakandi skúlin eigur at fáa upplýst, fyri at móttakandi skúlin kann lofta barninum.

Við hesum uppskoti til áseting verður virkað fyri barnsins besta, m.a. at barnsins tørvur verður møttur. Hugtakið *barnsins besta* verður nýtt í altjóða barnarættindasáttmálanum hjá ST, og eisini í føroyskari familjurættarligari lóggávu, og skal skiljast samsvarandi hesum.

Hóast, at hvør skúli sær er sín egni stovnur, so er undirvísingargongdin ein samlað gongd, ið skal hanga saman og tryggja, at barnið fær skipaða undirvísing í 9 ár, og kann nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini, sbrt. § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022. Hetta óheft av, hvar barnið gongur í skúla. Undirvísingin má skipast til tann einstaka næmingin, og hetta er einans møguligt, um skúlin hevur allar neyðugar upplýsingar. Av tí at allar neyðugar upplýsingar fara at liggja í Kervi+, er skynsamt at regulera økið, og hava ásetingar um, hvussu skúlar kunnu flyta upplýsingar ímillum sín.

Við hesum uppskoti verður útgangsstøðið, at fyrrverandi skúlin er tann, ið á fyrsta sinni má meta, um skúlin hevur skrásett upplýsingar, sum skúlin metir, at ein móttakandi skúli eigur at fáa. Metir fyrrverandi skúlin, at móttakandi skúlin eigur at fáa ávísar upplýsingar, skal fyrrverandi skúlin biðja skrásetta um loyvi. Er skrásetti undir 18 ár, er tað tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ið skulu loyva, at upplýsingar um barnið verða latnar móttakandi skúlanum. Noktar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, at upplýsingarnar verða latnar móttakandi skúlanum eftir § 2, stk. 1 í hesum lógaruppskoti, skal fyrrverandi skúlin venda sær til Undirvísingarstýrið og lýsa málið. Metir fyrrverandi skúlin ikki, at tað eru upplýsingar, ið móttakandi skúlin skal hava, so er útgangsstøðið, at upplýsingar ikki verða latnar víðari, og tað er ikki neyðugt at biðja tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, um loyvi.

Upplýsa tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, við byrjan á einum móttakandi skúla um viðurskifti, ið hava gjørt seg galdandi á fyrrverandi skúlanum ella viðurskifti, sum skúlin metir hava gjørt seg galdandi á fyrrverandi skúlanum, hóast móttakandi skúlin ikki hevur fingið kunning frá fyrrverandi skúlanum, so kann móttakandi skúlin biðja um loyvi frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, til at biðja fyrrverandi skúlan um upplýsingar um hesi viðurskifti. Geva foreldrini loyvi, skal fyrrverandi skúlin lata móttakandi skúlanum upplýsingarnar. Geva foreldrini (ella bara tað eina) ikki loyvi, skal skúlin venda sær til Undirvísingarstýrið og lýsa málið.

Um einki loyvi fæst frá persóni, sum hevur lut í foreldramyndugleikanum eftir stk. 1, skal Undirvísingarstýrið partshoyra tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan. Undirvísingarstýrið skal síðani meta, um persónsupplýsingar skulu latast móttakandi skúlanum. Í metingini skal Undirvísingarstýrið, umframt frágreiðingina frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, m.a. taka atlit at barnsins tørvi, áhugamálum, læring, heilsu, hvørjar persónsupplýsingar talan er um, umframt at taka atlit at, hvat skal til fyri at tryggja trivnaðin. Barnið skal verða loftað og møtt, har sum tað er, og fáa neyðugu hjálpina.

Í førum, har børn eru umsorganaryvirtikin, er tað tann, sum hevur umsorganaryvirtikið barnið, ið skal geva loyvi. Hetta kann vera einstakir persónar ella barnaverndartænastan.

Undirvísingarstýrið skal tryggja sær, at skikkað starvsfólk sum t.d. fulltrúi innan økið, viðgera málið og taka avgerð í málinum. Í summum førum kann vera neyðugt at leita sær ráðgeving hjá serfrøðingum á økinum, t.d. hjá Sernámi og møguliga hjá barnaverndini. Í serligum førum kann tað eisini verða neyðugt at partshoyra barnið.

Metir Undirvísingarstýrið, at persónsupplýsingarnar, við atliti at barnsins besta, eiga at latast móttakandi skúlanum, so kann Undirvísingarstýrið taka avgerð um, at móttakandi skúlin skal fáa persónsupplýsingarnar. Um Undirvísingarstýrið tekur avgerð um, at persónsupplýsingar skulu latast móttakandi skúlanum, er talan er um eina fyrisitingarliga avgerð.

Í summum førum verða ávísar upplýsingar (t.d. viðkvæmar upplýsingar), ikki skrásettar beinleiðis í Kervi+, men í eini skjalføringarskipan, sum verður knýtt at Kervi+. Hesar upplýsingar, ið eru skrásettar í skjalføringarskipanini, skulu eisini latast víðari til tann móttakandi skúlan, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, loyva tí, ella um Undirvísingarstýrið hevur tikið avgerð um tað.

Vísast kann á, at tað í dag eru ásetingar í øðrum lóggávum, ið á ávísum punktum eru sambæriligar við § 2, stk. 2 í hesum lógaruppskoti ella sum leggja upp til okkurt líknandi. Eitt dømi er § 19 í passkunngerðini (kunngerð nr. 994 frá 11. oktobur 2012 for Færøerne om pas, m.v.). Útgangsstøðið er, at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, skulu samtykkja, áðrenn løgreglan kann gera eitt pass, sbrt. § 19, stk. 1 í passkunngerðini. Er talan um felags foreldramyndugleika, er tað nóg mikið, at tann eini, ið hevur foreldramyndugleika, skrivar undir, um hin, ið hevur foreldramyndugleikan, vegna fráveru, sjúku ella annað, er forðaður í at samtykkja, sbrt. § 19, stk. 2. Løgreglan kann tó loyva, at eitt pass verður gjørt uttan samtykki eftir § 19, stk. 1 og 2 (t.v.s. uttan samtykki frá nøkrum av teimum, ið hava foreldramyndugleikan), tá serligar umstøður tala fyri at geva barninum eitt pass, sbrt. § 19, stk. 3 í passkunngerðini. Í § 2, stk. 3 í hesum lógaruppskoti er ásett, at ein avgerð um, at upplýsingar skulu latast einum øðrum skúla, kann kærast til landsstýrisfólkið. Slík áseting er ikki í passkunngerðini, og løgreglan hevur tí endaliga avgerðarrættin. Mett verður, at tað skal vera møguligt at kæra eftir hesum lógaruppskoti.

Mett verður, at § 2, stk. 2 er í samsvari við § 27, stk. 2 og 3 í fyrisitingarlógini. Sambært § 27, stk. 2, kunnu tær í stk. 1 nevndu upplýsingar (trúnaðarupplýsingar og heilt privat viðurskifti hjá einstaklingum) latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika tá: 1) hann, sum upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki, 2) tað fylgir av lóg ella ásetingum við heimild í lóg, at upplýsingin skal latast víðari, 3) upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt fara fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan, herundir umhugsni hjá honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella 4) tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella tað er neyðugt fyri at ein myndugleiki kann fremja eftirlits- ella umsjónaruppgávur. Eftir § 27, stk. 3 kunnu aðrar trúnaðarupplýsingar, umframt tær í stk. 2 nevndu, bert latast víðari til annan fyrisitingar-myndugleika, tá tað má metast, at upplýsingin er av stórum týdningi fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

Sambært § 46, stk. 2 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023 (hereftir barnaverndarlógin), skulu upplýsingar um mál í størst møguligan mun innheintast í samstarvi við tann, ið málið snýr seg um. Tað er ásett í § 46, stk. 2, at starvsfólk innan tað almenna og onnur, sum í starvi sínum hava kunnleika til mál, ið verða viðgjørd sambært lógini, hava skyldu at lata upplýsingar, sum viðvíkja málinum, til barnaverndarumsitingina, um barnaverndarumsitingin krevur tað. Við § 2, stk. 2 í lógaruppskotinum hevur fyrrverandi skúlin skyldu til at lata móttakandi skúlanum upplýsingar, um foreldrini hava givið loyvi ella um Undirvísingarstýrið hevur tikið avgerð hesum viðvíkjandi.

Til stk. 3.

Um Undirvísingarstýrið tekur avgerð eftir stk. 2 um, at persónsupplýsingar skulu latast einum øðrum skúla, er talan um eina fyrisitingarliga avgerð. Avgerðin kann kærast til landsstýrisfólkið innan eina viku, roknað frá tí degi avgerðin er tikin. Tað er tann skrásetti, ið kann kæra avgerðina, ella, um tann skrásetti er undir 18 ár, so eru tað tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ið ikki góvu loyvi eftir § 2, stk. 1, ið kunnu kæra avgerðina. Í førum, har tann skrásetti er umsorganaryvirtikin, er tað tann, sum hevur umsorganaryvirtikið barnið, ið kann kæra avgerðina.

Fyrrverandi skúlin skal ikki lata móttakandi skúlanum persónsupplýsingarnar, fyrr enn kærufreistin er farin.

Fyri at barnið ikki skal líða undir, at ein móttakandi skúli ikki kann fáa upplýsingarnar fyrr enn ein møgulig kærufreist er farin, er longdin á kærufreistini ásett til eina viku, soleiðis at móttakandi skúlin kann fáa neyðugar upplýsingar skjótast gjørligt.

Viðvíkjandi kæru er útgangsstøðið, at ein kæra ikki hevur steðgandi virknað. Kærumyndugleikin kann tó taka avgerð um, at eitt mál skal hava steðgandi virknað. Um kærumyndugleikin tekur avgerð um, at eitt mál skal hava steðgandi virknað, skal kærumyndugleikin miða ímóti at boða fyrrverandi skúlanum frá hesum, áðrenn kærufreistin er farin, soleiðis at persónsupplýsingarnar ikki verða latnar víðari. Fyrrverandi skúlin má tá ikki lata persónsupplýsingarnar víðari, fyrr enn kærumyndugleikin hevur tikið endaliga avgerð í málinum.

Til stk. 4.
Ávísir almennir stovnar hava sambært lóg heimild at fáa upplýsingar frá øðrum myndugleikum. T.d. hevur Studni sambært § 23, stk. 1 í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul (sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desembur 2021), heimild til at fáa tær upplýsingar um umsøkjarar frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna/játta stuðulin og innkrevja lán. Hetta kann t.d. verða frá Landsfólkayvirlitinum, Almannaverkinum, útbúgvingarstovnum, o.s.fr. Eisini kann talan verða um, at ein stovnur hevur heimild eftir dátuverndarlógini at viðgera ávísar upplýsingar (t.v.s. at stovnurin lýkur meginreglurnar og hevur viðgerðarheimild sambært dátuverndarlógini). Í slíkum førum er ikki neyðugt við loyvi frá skrásetta, ella tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, fyri at fáa hesar upplýsingar. Tað er tá heimild til, at upplýsingarnar verða latnar víðari.

Til stk. 5:
Við hesum verður heimild fingin til vegar at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, og at útflýggja hesar upplýsingar umvegis Kervi+.

Almennir myndugleikar, ið hava fyri neyðini at fáa upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, kunnu útvega sær hesar upplýsingar, sbrt. § 29, stk. 1 í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 (hereftir lóg um fólkayvirlit). Eftir § 31, stk. 1 í lóg um fólkayvirlit, hava myndugleikar einans heimild at lata hesar upplýsingar víðari til aðrar almennar myndugleikar, tá hetta er heimilað í lóg, ella tá ið Innlendismálaráðið (nú Løgmálaráðið) hevur givið loyvi til tess.

Ein integratión millum Kervi+ og Landsfólkayvirlitið verður gjørd, við tað at Kervi+ fer at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Í sambandi við innskriving í skúlum mugu skúlar, og møguliga aðrir viðkomandi stovnar knýttir at skúlaøkinum, fáa útflýggjað hesar upplýsingar. Av tí at Kervi+ fer at innihalda hesar upplýsingar, er skynsamt, at allir skúlar

kunnu fáa hesar upplýsingar beinleiðis úr Kervi+, í staðin fyri, at skúlarnir hvør sær venda sær til Landsfólkayvirlitið.

Upplýsingarnar, ið talan er um, eru navn, p-tal, bústaður og navn á persónum, ið hava lut í foreldramyndugleikanum. Tað er neyðugt við upplýsingum um navn og p-tal fyri at kunna eyðmerkja persónar. Tað er neyðugt at kenna bústaðin m.a. fyri at vita, hvat skúlaøkið næmingurin hoyrir til (og harvið, hvar hann skal upptakast/innskrivast), og fyri at vita, hvørjari kommunu persónurin er knýttur at, tí næmingagjaldið skal gjaldast av tí kommununi, har viðkomandi næmingur býr, og fyri at kunna skipa fyri ferðing til og frá skúla. Eisini er neyðugt at vita, hvør ið hevur lut í foreldramyndugleikanum, fyri at kunna samskifta og samstarva við hesi um ymisk viðurskifti hjá barninum, meðan tað gongur í skúla. Mett verður, at tað er viðkomandi og neyðugt hjá skúlunum at hava atgongd til hesar upplýsingar umvegis Kervi+, so leingi man er næmingur í skúlanum.

Við hesari áseting er heimild tí fingin til vegar fyri, at upplýsingarnar bæði kunnu heintast úr Landsfólkayvirlitinum, og fyri at kunna útflýggja hesar upplýsingar úr Kervi+ til viðkomandi skúlar og stovnar.

Til § 3
Til stk. 1.
Ásett verður, at Undirvísingarstýrið er dátuábyrgdari, tá ið Undirvísingarstýrið nýtir upplýsingar í Kervi+ til egin endamál, t.v.s. tá Undirvísingarstýrið ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónsupplýsingar í Kervi+ kunnu viðgerast.

Hugtakið *dátuábyrgdari* skal skiljast í samsvari við § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini, tað vil siga ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónsupplýsingar kunnu viðgerast.

Til stk. 2
Almenni stovnurin ella løgfrøðiligi persónurin, ið er brúkari av Kervi+, er dátuábyrgdari, tá ið brúkarin nýtir upplýsingar úr Kervi+ til egin endamál. Í hesum sambandi er Undirvísingarstýrið dátuviðgeri vegna dátuábyrgdaran.

Hugtakið *dátuviðgeri* skal skiljast í samsvari við § 6, nr. 7 í dátuverndarlógini, tað vil siga ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum viðger persónupplýsingar dátuábyrgdarans vegna.

Til stk. 3
Ásetingin heimilar landsstýrisfólkinum at áseta reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at landsstýrisfólkið viðger persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 2.

Í § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini er ásett, at viðgerðin hjá einum dátuviðgera skal vera grundað á avtalu, sum er bindandi, og sum m.a. ásetir evnið fyri viðgerðini, endamál, eins og skyldur og rættindi hjá dátuábyrgdaranum. Í viðmerkingunum til § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini stendur, "*at tá ein dátuviðgeri viðger persónsupplýsingar fyri ein dátuábyrgdara, skal hetta vera gjørt sambært bindandi avtalu ella øðrum rættarligum skjali*".

Endamálið við § 3, stk. 3 í hesum lógaruppskoti er at heimila landsstýrisfólkinum at áseta reglur, ið innihaldsliga lúka krøvini til eina dátuviðgerðaravtalu og eru bindandi fyri partarnar.

Tá slík kunngerð er sett í gildi, er ikki neyðugt at hava dátuviðgerðaravtalur við hvønn einstakan Kervi+ brúkara (skúlar og stovnar). Í staðin kann vísast til kunngerðina við heimild í hesi grein.

Til § 4
Til stk. 1
Landsstýrisfólkið í útbúgvingarmálum hevur í delegatiónsskrivi (seinasta dagfesting tann 25. novembur 2019) latið Undirvísingarstýrinum heimildir at útinna sína vegna. Umframt ítøkiligu lógarásettu heimildirnar, hevur landsstýrisfólkið eisini lagt til Undirvísingarstýrið at hava eftirlit við útbúgvingarstovnum, ið hoyra undir málsræðið hjá landsstýrisfólkinum. Eisini kann Undirvísingarstýrið geva ávísum stovnum tænastuboð. Hetta merkir, at teir í delegatiónsskrivinum til eina og hvørja tíð nevndu útbúgvingarstovnarnir vísa til Undirvísingarstýrið, heldur enn beinleiðis til ráðið.

Undirvísingarstýrið umsitur í verandi stund fólkaskúlan, miðnámsskúlar, maritimar skúlar og aðrar skúlar, og tekur sær av fyrisitingarligum rakstraruppgávum í undirvísingarverkinum. Landsstýrisfólkið í útbúgvingarmálum kann til eina og hvørja tíð dagføra delegatiónsskrivið, og broytingar kunnu tí koma í.

Fyri at kunna umsita og hava eftirlit við økinum, sum landsstýrisfólkið í delegatiónsskrivi hevur latið Undirvísingarstýrinum, verður ásett, at Undirvísingarstýrið kann nýta persónsupplýsingar úr Kervi+ til at umsita Kervi+, at umsita skúlarnar, til eftirlit, o.a. Eisini kann Undirvísingarstýrið m.a. nýta upplýsingar í Kervi+ til at veita ítøkiliga ráðgeving til skúlarnar.

Undirvísingarstýrið hevur dagligu ábyrgdina av Kervi+ og umsitur skipanina. Tað er tí Undirvísingarstýrið, ið ger av, hvussu skipanin skal nýtast, hvussu brúkarar skráseta upplýsingar í Kervi+ o.s.fr.

Samlaða skúlaverkið er ein ógvuliga samansett skipan, ið fevnir um øki frá fólkaskúla til miðnám, maritimar skúlar og aðrar skúlar. Tað er avgerandi, at ein fastur leistur er fyri skráseting. Hetta fyri at tryggja, at allir næmingar eru skrásettir rætt, at eingin gleppur ímillum, og at næmingar ikki eru skrásettir fleiri ferðir. Hetta er ein avbjóðing, sum Kervi + kann loysa. Undirvísingarstýrið skal tí tryggja, at skipanin verður brúkt rætt og at tað verður skrásett rætt og skrásett eins tvørtur um skúlar.

Undirvísingarstýrið fær m.a. eisini við Kervi+ innlit í allar næmingaskrásetingar, sum er ein fortreyt hjá Undirvísingarstýrinum fyri at hava yvirlit og eftirlit við eitt nú næmingafráverum. Hetta er eitt grundleggjandi amboð at fyribyrgja skúlaaftran og seta neyðug tiltøk í verk rættstundis. Harafturat kunnu næmingatølini nýtast til eitt nú játtan av tímum/fígging til skúlarnar eftir galdandi reglum.

Til § 5
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 7. mars 2024

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Fróðskaparsetri Føroya
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Námi
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Undirvísingarstýrinum
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Yrkisdeplinum